
Mynd: BP

# Í morgin kann Saudi-Arabia broyta oljupolitikkin

**Jógvan Hugo Gardar**

03.12.2015 - 17:39

Oljan.fo

Ófriðurin á oljumarknaðinum farna árið hevur fingið loyvi at halda fram, uttan at Saudi-Arabia og hini OPEC-londini hava rætt hond frá síðu. Orsøkin til at OPEC-londini ikki hava minka um sína framleiðslu verður av greinarum mett at vera ein revsing av amerikansku oljuframleiðsluni, og ein roynd at trýsta USA til at minka um oljuframleiðsluna. Talið á boripallum sum framleiða olju hana eisini minka í stórum hetta árið.

Nú røkist okkurt tó fyri at Saudi-Arabia kann koma at broyta kós. Í morgin hittast OPEC-londini.

Sambært TDN Finans skal Saudi-Arabia hava eitt uppskot klárt at leggja fram á OPEC-fundinum, har landið vil skjóta upp at framleiðslan minkar við einari millión føtum um dagin.

TDN Finans skrivar at sjálvt um tað ikki røkist fyri at nøkur semja kemur í morgin, so kann hetta vera fyrsta stigið hjá OPEC til at vera til reiðar at gera neyðugar broytingar í 2016, ið flestu greinarar meta verður eitt ófriðarligt oljuár.